Samskipari til Vinnuhúsið

Vilt tú vera við til at bera vinnuna framá? Megnar tú at samskifta, samskipa og fáa tingini at ganga upp í hægri eind? So eigur tú at søkja starv í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir samskipara til Vinnuhúsið. Sum samskipari fert tú at arbeiða við at samskipa innanhýsis verkætlanir og fundir, gera vegleiðingar, kunning, innheinta upplýsingar og at fyriskipa tiltøk.

Arbeiðið fevnir um at:

- Samskipa innanhýsis verkætlanir
- Gera skrivligar vegleiðingar
- Innheinta og greina upplýsingar
- Arbeiða við heimasíðum
- Arbeiða við kunning
- Fyriskipa tiltøk o.l.

Starvið krevur góð samstarvsevnir og evnir at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit vænta, at tú:

- Hevur hóskandi meðallanga útbúgving á bachelorstøði ella samsvarandi
- Hevur kunnleika til føroyska arbeiðsmarknaðin
- Hevur kunnleika til føroyska vinnu
- Dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum máli
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst

Vit bjóða tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv.

Løn eftir avtalu.

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. juni kl 12.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Maritu Rasmussen, stjóra, tel. 739909.

Umsóknin skal sendast til:

Vinnuhúsið
industry@industry.fo
att: Marita Rasmussen

sansir.fo

Vinnuhúsið er felags heiti fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum umframt føroysku vinnufeløgini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum gevur politiska ávirkan.
Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum, sí eisini www.industry.fo.

Smærugøta 9A // FO-100 Tórshavn // Tel: +298 30 99 00 // Fax: +298 30 99 01 // industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY